# Ársfrágreiðing um altjóða menningarsamstarv og neyðhjálp 2024









LØGMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Justice

# FORORÐ

Humaniterur stuðul ger ikki einans mun fyri støðuna hjá einum einstaklingi her og nú. Summar avleiðingar síggjast beinanvegin, sum hjá Viktoriiu og børnunum, har alt nærumhvørvið nú gleðist um, at familjan hevur umstøður og stuðul at búgva saman. Summar avleiðingar koma vónandi so líðandi, sum hjá børnunum og teimum ungu, sum fáa atgongd til útbúgving og førleikamenning, og hjá kvinnunum, sum gerast átaksleiðarar fyri at broyta framtíðina hjá sínum lokalsamfelagi. Og í øðrum førum geva vit humaniteran stuðul við vónini um at fyribyrgja avleiðingunum, sum kunnu koma av at vera í eini kreppustøðu, ein ikki hevur møguleika at sleppa úr einsamallur.

Í 2024 stuðlaðu vit nøkrum av heimsins mest átroðkandi kreppum. Hetta eru bæði tær, sum vit dagliga hoyra um í miðlunum og tær, sum vit ikki mugu gloyma. Tí hóast vit ikki tosa um tær, so snúgva tær seg um menniskju, sum ynskja og hava uppiborið virðiliga yvirliving.

Verkætlanirnar og neyðhjálparátøkini, sum vit stuðlaðu í 2024, fevna um alt frá møguleikum til kvinnur og upprunabólkar at ala karpu og vatnfisk í hyljum í Bangladesh fyri at vinna til lívsins uppihald til at bøta bumbuskýli í barnagørðum í Ukraina og útvega tilfar, so børnini kunnu gloyma seg burtur í spæli undir loftálopum.

Kreppur kunnu raka okkum øll, men eingin verður ávirkar eins. Náttúru- og veðurlagsvanlukkur gerast tíverri títtari og ógvisligari, og stórar avbjóðingar krevja stórt samstarv. Okkara leiklutur skal ikki lata nakran iva vera um, at vit taka okkara ábyrgd í álvara at virka fyri humaniterum loysnum til einstaklingin, til nærumhvørvið og til alheimssamfelagið.

Tó eru glottar at hóma so leingi lond, felagsskapir og sjálvboðin heilt frá altjóða støði til lítlu bygdirnar brenna fyri rættindum, fyri inklusjón, fyri barnavernd, fyri virðiligum vinnumøguleikum, fyri sjálvræði og sjálvbjargni, fyri fólkaheilsu og fyri umhvørvinum. Í hjartanum í eini kreppustøðu stendur eitt menniskja, ið tørvar hjálp, eins og menniskju, ið ynskja at hjálpa. Hava vit umstøðurnar til tað, so eru tað bæði okkara framíhjárættindi og okkara skylda at stuðla teimum, ið vilja stuðla øðrum.



Bjarni K. Petersen
*Landsstýrismaður í lógarmálum*

# INNIHALDSYVIRLIT

**Inngangur** 4

Raðfestingar 4
Altjóða samstarv um humaniteran stuðul 5
Kríggið í Ukraina 6
Myndir og luttøka í ársfrágreiðingini 7

**Útgoldin stuðul í 2024** 8

Verkætlanarstuðul býttur eftir landi 9
Stuðul til neyðhjálp býttur eftir landi 10

**Ráðgevandi nevndin fyri altjóða menningarsamstarv** 11

**Verkætlanarstuðul til altjóða menningarsamstarv** 12

Verkætlanarstuðul býttur eftir høvuðsgeira 14
Barnavernd 15
Sálarlig heilsa 18
Heilsa og reinføri 19
Inklusjón 20
Útbúgving 21
Alivinna 23

**Stuðul til neyðhjálparátøk** 25

Stuðul til neyðhjálp býttur eftir høvuðsgeira 26
Skjól 28
Náttúru- og veðurlagsvanlukkur 28
Torgreiddar kreppur 30
Barnavernd 32
Flóttar 34
Matur 35
Heilsa og reinføri 35

## INNGANGUR

Humanitera støðan í heiminum hevur havt ilt við at fóta sær eftir Covid-19 farsóttina. Altjóða inflatión, kríggið í Ukraina og alheims turkur hava minkað um møguleikarnar at veita mat til neyðstødd. Náttúru- og veðurlagsvanlukkur gerast alsamt títtari og ógvisligari, og tær ringastu avleiðingarnar raka allar oftast tey, sum hava minstu ávirkan á veðurlagið. Altjóða reglur um kríggj verða ofta ikki virdar, og tað rakar altíð tey harðast, sum ikki hava nakra ávirkan á ófriðin. Torgreiddar kreppur, sum hava vart í fleiri ár, verða gloymdar í miðlunum og almenna tilvitinum, tí nýggjar vanlukkur hava størri tíðindavirði. Men eisini í langdrignu kreppunum eru menniskju í milliónatali, sum ynskja eitt virðiligt lív og vón fyri framtíðina, og sum hava uppiborið stuðul til at taka ræði yvir egnum lívi.

### Raðfestingar

Sambært løgtingslóg nr. 44 frá 14. mai 2007 um altjóða menningarsamstarv kann stuðul latast til verkætlanir, ið ætla at skipa haldgóða fyrisiting, at fáa búskaparvøkstur og at tryggja sosial framstig. Harumframt vísa leiðreglurnar á, at verkætlanir verða raðfestar, sum fevna um ST heimsmálini 1: Einki fátækadømi, 2: Eingin hungur, 3: Góð heilsa og vælferð, 4: Dygdargóð útbúgving, 5: Javnstøða millum kyn og 14: Lív í havi.




Í samsvari við heildarraðfestingina hjá landsstýrinum at tryggja góð og trygg kor fyri børn og ung bæði heima og úti í heimi at vaksa upp og mennast, legði landsstýrið harumframt dent á at stuðla verkætlanum og neyðhjálparátøkunum til frama fyri børn og ung.

**Altjóða samstarv um humaniteran stuðul**

Síðan 2016 hava felagsskapir, ST-stovnar og lond samstarvað um humanitert arbeiði sambært Grand Bargain avtaluni, ið samstarvsfelagarnir samdust um á World Humanitarian Summit í Istanbul. Avtalan leggur dent á lokalisering, sum merkir at veita meira beinleiðis fígging til lokalar felagsskapir, ið kenna støðuna best og hava bestu fortreytir at røkka luttakarum á staðnum. Eisini leggur avtalan dent á at veita langtíðarstuðul og at minka um fyrisitingarligu krøvini, so fleiri felagsskapir kunnu luttaka í humaniterum arbeiði og lúka krøv um eftirlit, frágreiðing, roknskap og annað fyrisitingarligt arbeiði. Størsti denturin skal tó leggjast á at seta tørvin og ynskini hjá teimum, ið eru rakt av kreppuni, fram um egin áhugamál. Lokalu luttakararnir í verkætlanum og móttakararnir av neyðhjálp skulu sjálvi hava møguleika at mynda humanitera arbeiðið, og fíggingin skal stuðla teimum at taka ræði yvir egnum lívi.

Síðan 1970ini hava Sameindu Tjóðir havt sum endamál, at háinntøkulond skulu miða eftir at lata 0,7% av bruttotjóðarinntøkuni (Gross National Income) í humaniterum stuðli til láginntøkulond. Hóast játtanin frá Føroya landsstýri til humaniteran stuðul er økt munandi frá 3,8 mió. kr. í 2007 til 15,675 mió. kr. í 2024, so hevur talan ongantíð verið nær námind teimum 0,7% av bruttotjóðarinntøkuni. Lutfallið hevur tó verið støðugt vaksandi síðan 2016, og í 2023[1] vórðu 0,057% av bruttutjóðarinntøku Føroya á 27,1 mia. kr. latin sum altjóða humaniterur stuðul áljóðandi 15,5 mió. kr.




[1] Tølini fyri 2023 eru nýggjastu tølini fyri bruttutjóðarinntøku (BTI), sum eru tøk frá Hagstovuni.

**Kríggið í Ukraina**

Av tí at kríggið enn er í gongd, men nú hevur vart í eina løtu, verður hjálpararbeiðið í Ukraina bæði nevnt neyðhjálp (emergency response) og afturmenning og endurbygging (recovery and reconstruction). Vanliga er talan um neyðhjálp upp til seks mánaðir eftir, at ein vanlukka er yvirstaðin, og síðan verður talan um menningarsamstarv. Hesar tulkingar eru tó ikki bindandi fyri, hvat fyri slag av stuðli kann latast nær og hvar.

Í 2024 samstarvaðu umleið 500 humaniterir felagsskapir og ST-stovnar við stjórnini í Ukraina at samskipa neyðhjálpina og menningarsamstarvið í landinum. Humanitera arbeiðið verður samskipað gjøgnum eina bólkaskipan (cluster system), har UN OCHA (United Nations Office for the Coordination of Humanitarian Affairs) er samskiparin í miðjuni, og aðrir stovnar og altjóða felagsskapir vara av hvør sínum geira, ið samsvarar við teirra serfrøði. 14 bólkar ella geirar vóru virknir í Ukraina í 2024, ið samstarvaðu um t.d. flóttahjálp, útbúgving, mat, logistikk, vernd, barnavernd, heilsu, reinføri, bústaðir og telesamskifti. Sí bólkaskipanina niðanfyri.




Heildarætlanin hjá ST mælti til at stuðla gjøgnum felagsskapirnar, ið longu eru til staðar og luttaka í heildarætlanini. Eisini mælti heildarætlanin til, at felagsskapirnir leggja dent á at fáa

fíggjarligan stuðul og mæla staðiliga frá at fáa lutir sendandi. Hetta er bæði vegna órógv á lokala marknaðin, ið roynir at fóta sær gjøgnum óvissuna, og tí einans fáir felagsskapir hava neyðugu førleikarnar at samskipa logistikk so sum vøruflutning og goymsluhús í økinum.

**Myndir og luttøka í ársfrágreiðingini**

Allar myndir og søgur, sum eru í frágreiðingini, eru frá ítøkiligu verkætlanunum og neyðhjálparátøkunum, sum hava fingið stuðul í 2024, og allar eru endurgivnar við samtykki. Sambært ynski frá luttakarunum eru summi nøvn broytt og summi andlit fjald.

## ÚTGOLDIN STUÐUL Í 2024

Játtanin á fíggjarlógini fyri 2024 til altjóða menningarsamstarv og neyðhjálp var 15,675 mió. kr. Játtanin kann flytast millum báðar undirkonturnar eftir tørvi. Við árslok var útgoldni stuðulin soleiðis býttur:

| | |
|---|---|
| Altjóða menningarsamstarv | 9.190.154,44 kr. |
| Neyðhjálp | 6.469.520,14 kr. |
| Avgreiðslugjøld hjá Gjaldstovuni | 11.140,00 kr. |
| Tilsamans | 15.670.814,58 kr. |

Stuðul til neyðhjálp snýr seg í høvuðsheitum um lívbjargandi tiltøk so sum matur, vetrarklæði, heilivágur og kreppuhjálp, meðan stuðul til altjóða menningarsamstarv sum dømi kann fevna um skúlagongd og sálarheilsu í krígsraktum økjum umframt nógv onnur tiltøk.

Fleiri felagsskapir ynsktu at fáa stuðulin útgoldnan í t.d. evrum ella dollarum. Tá verður nágreiniliga stuðulsupphæddin tongd at veksilkursinum júst tann dagin, stuðulin varð goldin gjøgnum Gjaldstovuna. Tískil eru onkuntíð smærri munir millum játtaðu stuðulsupphæddina í donskum krónum, sum er frámerkt í hesi ársfrágreiðing, og nágreiniliga útgjaldið til felagsskapirnar, sum talvan omanfyri vísir.

**Verkætlanarstuðul býttur eftir landi**

Í samsvari við ynskið hjá landsstýrinum at leggja dent á stuðul til humanitert virksemi í Ukraina fóru 62% av samlaða stuðlinum til altjóða menningarsamstarv til verkætlanir í Ukraina. Átta onnur lond í Afrika, Asia og Karibiska havinum og ein heimspartur (Miðeystur og Norðurafrika) fingu 38% av verkætlanarstuðlinum til altjóða menningarsamstarv. Harav vórðu fimm lond umboðað gjøgnum verkætlanina hjá Firum (Kuba, Malavi, Sierra Leone, Jamaika og Nikaragua).



**Stuðul til neyðhjálp býttur eftir landi**

Stuðul varð latin til 18 neyðhjálparátøk, har fýra teirra vóru partur av virkisætlanini hjá Reyða Krossi Føroya, ið varð stuðlað sambært samstarvsavtalu við Føroya landsstýri. 39% av stuðlinum fór til seks neyðhjálparátøk í Ukraina, og 17% av stuðlinum fór til tvey neyðhjálparátøk í Libanon. Eitt av átøkunum í Libanon var partur av virkisætlanini hjá Reyða Krossi Føroya. Sjey onnur neyðhjálparátøk vórðu stuðlað í hvør sínum landi, sum vóru Vanuatu, Armenia, Gaza, Haiti, Ísland og Sýria.



## RÁÐGEVANDI NEVNDIN FYRI ALTJÓÐA MENNINGARSAMSTARV

Nýggj ráðgevandi nevnd fyri altjóða menningarsamstarv tók við 1. apríl 2024, tá fýra ára skeiðið hjá farnu nevnd var lokið. Ráðgevandi nevndin fyri altjóða menningarsamstarv verður sett sambært § 4 í løgtingslóg nr. 44 frá 2007 um altjóða menningarsamstarv, sum sigur, at ein nevnd á fimm limir skal ráðgeva landsstýrisfólkinum at fremja lógina í verki.

Umsóknir um altjóða menningarsamstarv verða latnar ráðgevandi nevndini, sum viðger umsóknirnar og mælir landsstýrisfólkinum til stuðulsjáttan frá Føroya landsstýri sambært tøku upphæddini á fíggjarlógini og løgtingslóg, kunngerð og leiðreglum um stuðul til altjóða menningarsamstarv.

Strembað verður eftir at hava eina ráðgevandi nevnd, ið umboðar ymisleika og javnbýti millum kyn, aldur og serkunnleika. Fakligu profilarnir hjá nevndarlimunum umboða serfrøðiliga vitan innan fimm av teimum størstu fakøkjunum, ið stuðulin til altjóða menningarsamstarv frá Føroya landsstýri umfatar.

Vanliga koma fleiri umsóknir um altjóða menningarsamstarv innan geirarnar útbúgving, heilsuverk og fólkaheilsu, arbeiði at fremja kor hjá minnilutabólkum og verkætlanir innan burðardygga vinnu, serliga fiskivinnu og alivinnu. Teir fimm nevndarlimirnir hava serfrøði innan hesar geirar, so teir kunnu nýta sín serkunnleika at meta um dygdina av umsóknunum og útlitini fyri, at verkætlanirnar fara at eydnast væl.

Nevndarlimirnir í ráðgevandi nevndini fyri altjóða menningarsamstarv fyri 2024 til 2028 eru:

- Ann Hermansdóttir, forkvinna, næmingaprestur og hevur tilknýti til vælgerandi felagsskapir í Føroyum.
- Óli Wolles, næstformaður, útbúgvingarleiðari og varalektari á Miðnámi í Kambsdali og hevur tilknýti til fakøkið útbúgving.
- Turið Maria Jóhansdóttir, aðalskrivari í Amnesty International Føroyar og hevur tilknýti til arbeiði til frama fyri minnilutabólkum.
- Ingvard Fjallstein, fólkapensjonistur og fyrrverandi málsviðgeri hjá Umhvørvisstovuni innan alivinnu við tilknýti til fakøkið burðardygg vinna.
- Monika Mohr, fulltrúi í Fólkaheilsustýrinum og hevur tilknýti til fakøkini heilsuverk og fólkaheilsa.

## VERKÆTLANARSTUÐUL TIL ALTJÓÐA MENNINGARSAMSTARV

Áðrenn umsóknarfreistina 3. mars 2024 komu inn 74 umsóknir um verkætlanir og neyðhjálparátøk í Ukraina á tilsamans 42,9 mió. kr. Av teimum søktu 58 um menningarverkætlanir á tilsamans 31.650.255,74 kr., og 16 søktu um neyðhjálparátøk á tilsamans 11.260.451,05 kr. Til altjóða menningarsamstarv komu inn 17 umsóknir á tilsamans 10.551.000,00 kr. Umsóknirnar vórðu viðgjørdar av ráðgevandi nevndini fyri altjóða menningarsamstarv, ið tilmældi landsstýrismanninum at játta stuðul til 20 verkætlanir. Harafturat varð stuðul tilmældur til tvær umsóknir sambært samstarvsavtalum. Umsóknarfreistir, umsóknarfrymlar, leiðbeiningar og kunning annars vóru alment tøk á heimasíðuni hjá Løgmálaráðnum, umframt at Løgmálaráðið leypandi svaraði fyrispurningum frá umsøkjarum.

Stuðulin til verkætlanir í Ukraina fór til 13 smærri felagsskapir, ið fingu játtanir millum 125.000 kr. og 450.000 kr., og til tveir størri altjóða felagsskapir (Hope and Homes for Children og World Food Programme), ið fingu játtanir á 600.000 kr. og 1.000.000 kr. Serliga stuðulin til smærri, lokalu felagsskapirnar hevur virkað framúr væl, har felagsskapirnir kunnu vísa á sera góð úrslit, ið røkka nógvum luttakarum fyri lítlan umsitingarkostnað, og tey sjálvbodnu vísa takksemi fyri álitið at kunna útinna vælgerandi arbeiði í sínum nærumhvørvi. Í altjóða humaniterum arbeiði verður dentur lagdur á 'lokalisering' sum eitt 'best practice', ið allir gevarar skulu miðja eftir, ið merkir at stuðla lokalum at útinna verkætlanir sjálvi og soleiðis uppbyggja sjálvræði, sjálvbjargni og burðardygd. Verkætlanirnar verða framdar í Kyiv, Chernihiv, Odessa, Kherson, Mykolaiv, Zaporizhzhia, Kharkiv, Poltava, Zhytomyr, Khmelnytsky, Donetsk og Lviv umframt online um alt landið, í Vesturukraina og í Landnyrðingsukraina og fevna tískil breitt um alt landið.

Stuðul til altjóða verkætlanirnar annars, ið ikki fevndu um Ukraina, varð játtaður til verkætlanir í Tansania, Uganda, Miðeystri og Norðurafrika (MENA økið), Bangladesh og fimm londum, ið luttóku í verkætlanini hjá Firum (Kuba, Malavi, Sierra Leone, Jamaika og Nikaragua). Fýra av verkætlanunum høvdu fingið stuðulsjáttan fyrr og høvdu tí framíhjárætt at fáa játtan aftur, ið sambært leiðreglunum kann gevast í mesta lagi tríggjar ferðir tilsamans til somu verkætlan. Tvær verkætlanir fingu stuðul á fyrsta sinni. Tær vóru stuðul til felagsskapin Sense International til yrkisútbúgvingar og inklusjón til ung, sum bera fjølbrek í Tansania, við denti á ung, ið eru deyvblind, og til felagsskapin Irise International, ið virkar fyri heilsu og reinføri á skúlum í Uganda, so gentur ikki missa skúlagongd, við denti á gentur, sum bera brek, og gentur, sum búgva í flóttafólkalegum. Harumframt fingu Altjóða Blái Krossur og Firum stuðul til humaniterar verkætlanir sambært samstarvsavtalum millum stovnarnar og landsstýrið.

Talvan niðanfyri vísir verkætlanirnar, ið fingu stuðulsjáttan til altjóða menningarsamstarv í 2024:

| Høvuðsgeiri | Land | Felagsskapur | Upphædd |
|---|---|---|---|
| Barnavernd | Ukraina | Hope and Homes for Children | 600.000 kr |
| Barnavernd | Ukraina | People in Peril | 300.500 kr |
| Barnavernd | Ukraina | Gender Club Dnipro | 375.700 kr |
| Barnavernd | Ukraina | Children of War | 375.700 kr |
| Heilsa og reinføri | Tansania | Altjóða Blái Krossur (samstarvsavtala) | 864.571,48 kr |
| Heilsa og reinføri | Uganda | Irise International | 367.700 kr |
| Heilsa og reinføri | Ukraina | The People to People Health Foundation | 450.000 kr |
| Sálarlig heilsa | Ukraina | Caritas Kyiv | 240.400 kr |
| Sálarlig heilsa | Ukraina | Space of Knowledge | 305.000 kr |
| Sálarlig heilsa | Ukraina | Zmist Poltava | 150.300 kr |
| Inklusjón | Tansania | Sense International | 384.000 kr |
| Inklusjón | Ukraina | Who But We | 185.400 kr |
| Inklusjón | Ukraina | Blagomay | 250.500 kr |
| Útbúgving | Tansania | New Life Outreach | 421.600 kr |
| Útbúgving | Ukraina | World Food Programme | 1.000.000 kr |
| Útbúgving | Miðeystur og Norðurafrika | Kirkjuliga Heimamissiónin | 481.000 kr |
| Útbúgving | Ukraina | Responsible Citizens | 300.500 kr |
| Útbúgving | Ukraina | Brokers Without Borders | 340.600 kr |
| Útbúgving | Ukraina | Ukrainian Smile | 390.300 kr |
| Útbúgving | Ukraina | Children of Heroes | 430.600 kr |
| Alivinna | Bangladesh | Food for the Hungry UK | 436.000 kr |
| Alivinna | Kuba, Malavi, Sierra Leone, Jamaika og Nikaragua | Firum (samstarvsavtala) | 546.684 kr |

**Verkætlanarstuðul býttur eftir høvuðsgeira**

Í samsvari við ynskið hjá landsstýrinum varð dentur lagdur á at stuðla verkætlanum, ið tóku atlit at umstøðum hjá børnum og ungum. Hetta sæst aftur í stuðulsbýtinum, har høvuðsgeirarnir við hægstu brotpartunum vóru útbúgving, heilsa og reinføri og barnavernd. Allar játtaðu verkætlanirnar høvdu sum beinleiðis ella óbeinleiðis endamál at bøta um kor hjá børnum og ungum við undantakinum um verkætlanirnar innan alivinnu. Tann eina verkætlanin innan alivinnu fekk játtan sambært samstarvsavtaluni við Firum um stuðul til humanitert virksemi í láginntøkulondum, og hin verkætlanin var triði og síðsti liður í verkætlan í Bangladesh, ið hevði fingið stuðul tvey tey undanfarnu árini.



# BARNAVERND

### Stuðul til útbúgving og sálarliga heilsu hjá børnum

**People in Peril – Chernihiv og Kyiv, Ukraina (300.500 kr)**

Tríggir sálarfrøðingar fremja 80 vitjanir og veita 300 sálarfrøðiligar viðgerðir til einstaklingar og bólkar. Seks ungdómsbólkar verða stovnaðir, har luttakararnir sleppa á eitt online skeið í sjálvmenning og fáa stuðul at útinna smærri verkætlanir í nærumhvørvinum. 12 verkstovur verða hildnar at upplýsa lokalu umhvørvunum um barnavernd, og 12 lokalir lærarar veita 864 eykaundirvísingartímar í støddfrøði, ukrainskum og enskum.

### CAMPUS Space for Children and Teenagers

**Gender Club Dnipro – Dnipro, Ukraina (375.700 kr)**

Felagsskapurin vil gera neyðugar ábøtur á ungdómsklubban í býnum, so hann kann lata upp aftur. Við stuðlinum vil ungdómsklubbin bjóða samrøður við sálarfrøðingi til ung í bólki og sum einstaklingar og halda fimm legur fyri børnum, sum hava mist foreldrini í hertænastu.

### Keeping Children Safe within Families

**Hope and Homes for Children – Kyiv og Dnipro, Ukraina (600.000 kr)**

Endamálið við verkætlanini var at hjálpa børnum, sum hava mist foreldrini í krígnum og nú búgva á barnaheimum, at verða integrerað í lokalar fosturfamiljur, og at hjálpa familjum í váðabólkum, so børnini kunnu verða búgvandi í familjuni.

Verkætlanin veitti 12.618 ukrainskum familjum í váðabólkum stuðul at fóta sær, til dømis við at finna nýtt starv ella fáa tænastur, hóast tey høvdu mist alla ogn og øll skjøl, tá tey flýggjaðu frá heimbygdini. Fleiri tørvaðu eisini hjálp til kropsligar og sálarligar skaðar av krígnum.

92% av børnum, sum búgva á barnaheimi í Ukraina, hava ein ella fleiri familjulimir, sum eru á lívi og sum kundu tikið sær av børnunum, um familjan fekk fíggjarliga og sosiala hjálp.

52% av børnum á barnaheimum í Ukraina bera brek, sum ger tey enn meira viðbrekin at vera fyri misrøkt. 50 familjur við børnum, ið bera brek, fingu hjálp, uppvenjing og fíggjarligan stuðul at megna at hava børnini búgvandi heima saman við familjuni.

Verkætlanin veitti 321 nýggjum fosturforeldrum venjing og góðkenning at taka móti børnum, sum ikki hava umstøður at vaksa upp í egnari familju. Harímillum fingu summi av fosturforeldrunum eyka venjing at taka móti børnum, sum bera brek.

Bussar við barna- og familjutænastum fóru til útjaðaraøki, sum leingi vóru óatkomandi vegna krígsførslu, har 849 børn og 552 foreldur fingu sálarliga hjálp eftir at hava upplivað kríggið

beinleiðis. 10 toymi vórðu stovnað í nærumhvørvinum at knýta lokalar sosialar tænastur saman at taka ímóti brúkarum.

Starvsfólkini í verkætlanini fingu harumframt stuðul at handfara arbeiðið undir sera truplu umstøðunum við kríggi og stórari menniskjaligari neyð.

Verkætlanin samstarvaði við Save the Children, myndugleikarnar í Kyiv og Dnipro og sosialar tænastur at veita vegleiðing og hjálp til barnaverndartænastuna í Ukraina at menna mannagongdir, so børn í váðabólkum kunnu vaksa upp í familjum, sum fáa stuðulstænastur í nærumhvørvinum, heldur enn á barnaheimi.

**Søgan hjá Andrii**




11 ára gamli Andrii hevur autismu, og tá kríggið byrjaði, fyltist hann við so nógvum ótta og angist, at hann ikki fekk sovið um náttina. Mamman vildi fegin hjálpa honum, men hon visti ikki, hvat hon skuldi gera. Andrii tosaði ikki í heilum setningum, men gekk allan dagin og endurtók orð, sum hann hevði hoyrt í tíðindunum so sum ”gev gætur” ella ”ávaring.”

Í Ukraina er í forvegin stórur tørvur á tilboðum til børn sum Andrii, ið bera brek, og tá kríggið byrjaði, gjørdist enn meira torført at fáa stuðul. Hetta førdi til, at Andrii var í vanda fyri at verða sendur á stovn langt burturi, hóast mamman ynskti at taka sær av honum heima.

Gjøgnum verkætlanina slapp Andrii fram at sálarfrøðiligari hjálp tvær ferðir um vikuna, har hann kom til talupedagog og terapi til børn gjøgnum list, bamsur og spæl. Børnini fingu eisini bamsur við heim at samskifta og ugga seg við.

Eftir tveir mánaðir steðgaðu óttatilburðirnir hjá Andrii, og hann byrjaði at sova um náttina uttan at vakna av marruni um luftálop. Verkætlanin hjálpti honum eisini at finna eitt skúlatilboð umvegis internetið, og hann er byrjaður at skilja spurningar og svara teimum. Mamman er ovurfegin um at hava fingið sína sólstrálu aftur.

**Søgan hjá Viktoriu**





Viktoria er ung, einlig mamma í Dnipro, Ukraina, sum er einsamøll um fýra børn. Hon er sjálv uppvaksin á barnaheimi í Ukraina. Við ongum fíggjarligum ella sosialum stuðli megnaði hon ikki sjálv at veita børnunum eitt trygt familjulív, so hon tók hørðu avgerðina at senda tvær av gentunum á barnaheim, hóast hennara ynski var at veita teimum ein betri uppvøkstur, enn hon sjálv fekk. Hon tók genturnar heim hvørt vikuskifti fyri at vera saman við teimum.

Tá kríggið byrjaði, stongdi barnaheimið uttan ávaring, og Viktoria varð noydd at flýggja við fýra børnum, sum hon ikki megnaði at taka sær av sum innanhýsis flótti, og tí var hon í vanda fyri at missa øll børnini. Ein bussur hjá verkætlanini møtti familjuni í Dnipro økinum, har familjan fekk sálarligan stuðul, mat og neyðsynjarvørur. Stuðulstoymið hjálpti Viktoriu at finna bústað til alla familjuna, fáa atgongd til sosialar tænastur og fáa øll børnini innskrivað í skúla.

Bæði Viktoria og íbúgvar í heimbygdini gleðast um, at familjan fær neyðuga stuðulin at sleppa at liva saman uttan at noyðast at senda børnini burtur at vaksa upp á stovni.

## Trygg og mennandi barnaár hóast kríggj

**Children of War – Khamianets-Podilskyi, Ukraina (375.700 kr)**

Verkætlanin stuðlar 960 børnum millum 6 og 16 ár, sum eru innanhýsis flóttar frá krígsøkjum, at luttaka í einum skipaðum bólkaskeiði við mati og uppihaldi saman við øðrum børnum í somu støðu. Útbúnir sálarfrøðingar hjálpa teimum at lekja trauma frá krígnum, at venja seg við eitt lív burtur frá krígnum, at sosialisera við onnur børn og luttaka í ítrótti, mentan, tónleiki, borðspølum og undirhaldi. Flestu av børnunum hava ikki havt atgongd til lækna, síðan kríggið byrjaði, so øll børn fáa læknakanning og tilboð um tær viðgerðir, teimum mátti tørvað. Eldru børnini fáa eisini lestrarvegleiðing.

## SÁLARLIG HEILSA

### Summarlegur við eyka undirvísing til skúlabørn úr krígsherjaðum økjum

**Space of Knowledge – Kyiv, Ukraina (305.000 kr)**




Saman við skúlanum Atlantic School í Kyiv skipaði felagsskapurin fyri tveimum summarlegum á tríggjar vikur fyri skúlabørnum, ið liva undir serligum umstøðum so sum innanhýsis flóttafólk ella sum hava mist eitt ella bæði foreldur. Summarlegurnar veittu fýra máltíðir um dagin, verkstovur við ítrótti, spølum og list, intensiva undirvísing í enskum, heilsufakligan og sálarfrøðiligan stuðul til luttakararnar og útferðir til mentanartilboð í nærumhvørvinum. Av tí at felagsskapurin megnaði at fáa avsláttur og góðan prís til tiltøkini, varð avlopið á verkætlanarjáttanini játtað at veita skúlagongd í eitt ár við fullum uppihaldi til fýra næmingar, sum luttóku á summarlegunum, og sum eru innanhýsis flóttar og hava mist eitt ella bæði síni foreldur.

### Sálarfrøðiligur stuðul til innanhýsis flóttar

**Zmist Poltava – Poltava, Ukraina (150.300 kr)**

Við verkætlanini vitjar felagsskapurin lokal øki at veita 24 bólkasamrøður við sálarfrøðingi til børn og foreldur ella verjar, sum eru innanhýsis flóttar, eins og verkætlanin heldur 24

bólkasamrøður við sálarfrøðingi í Poltava til børn og familjur, sum eru innanhýsis flóttar. Eisini verður stuðulin nýttur til 480 tímar av persónligum sálarfrøðiviðtalum til børn í Poltava.

### Child Friendly Space

**Caritas Kyiv – Kyiv, Ukraina (240.400 kr)**

Verkætlanin stovnar eitt frítíðartilboð til børn. Tilboðið veitir talupedagog, samrøðubólkar, tónleikaterapi og spøl, sum menna sosialar førleikar hjá børnum og foreldrum teirra. Eisini veitir verkætlanin tilboð til málmenning, støddfrøði og annað, og verkstovur verða hildnar fyri foreldrum um barnarøkt. Eisini veitir verkætlanin tilboð um sálarligan stuðul til strongd.

## HEILSA OG REINFØRI

### Ungdómslív uttan rúsevnismisnýtslu og harðskap

**Altjóða Blái Krossur – Arusha, Tansania (864.571,48 kr)**

Verkætlanin stuðlar ungdómi at liva lív uttan rúsevnismisnýtslu og harðskap vegna kyn, og at styrkja teirra felagsskapir, fortreytir og førleikar at megna lívsins umstøður so sum arbeiðsloysi og trong kor. Fyri at náa hesum endamálum ynskir verkætlanin at læra ung og viðkomandi samfelagsbólkar um fyribyrging av skaðum frá alkoholi og rúsevni, um týdningin av sálarheilsu og ábyrgd, um javnstøðu og trygd, og um týdningin av at hava sterkar felagsskapir, ið samstarva at røkka endamálunum. Verkætlanin miðar eftir at fáa fleiri ymiskar samfelagsbólkar við sum luttakarar, so verkætlanin kann stuðla holistiskari og burðardyggari menning í lokalsamfelagnum. Verkætlanarleiðslan verður somuleiðis lokal. Stuðulin verður latin sambært samstarvsavtalu við Bláa Kross Føroya.

### Heilsutænastur við hermótini

**The People to People Health Foundation – Kharkiv, Donetsk, Zaporizhzhia, Dnipro, Kherson og Mykolaiv, Ukraina (450.000 kr)**

Verkætlanin veitir útgerð til sjey heilsutænastur í seks krígsøkjum at gera “mobile medical teams” við einum lækna, einum sjúkrarøktarfrøðingi, einum sálarfrøðingi og einum bilførara, sum kunnu fara út til útjaðaraøki at veita 14.000 heilsu- og sálarfrøðiviðgerðir, vaksinur og annan heilivág til íbúgvar og føðslulíki til 400 pinkubørn við HIV.

### Heilsa og reinføri á skúlum, so gentur ikki missa skúlagongd

**Irise International – Jinja District og Nakivale flóttafólkalegan, Uganda (367.700 kr)**





Verkætlanin fevnir um 25 skúlar, sum fáa betri umstøður til vatn og reinføri. Lærarar og lokalir leiðarar í nærumhvørvinum við skúlarnar fáa upplýsing og upplæring í heilsu og javnrættindum, sum broyta neiligan hugburð og atburð um menstruatión og um rættindi hjá gentum, sum bera brek. 6.000 gentur, har av 1.000 bera brek ella eru flóttar, fáa reinførislutir til menstruatión, sum kunnu endurnýtast, so genturnar fáa betri umstøður at koma í skúla alt árið og tí fáa javnsettan ágóða av undirvísingartilboðum. Atgongd til skúla og útbúgving eru prógvað at føra við sær minking í vandanum, at gentur verða giftar burtur sum børn ella sjálvar gerast við barn áðrenn vaksnan aldur, og hevur eisini jaliga ávirkan á framtíðar fíggjarligar møguleikar og heilsuútlit.

## INKLUSJÓN

### Girl Power verkstovur til gentur

**Blagomay – Kyiv, Chernihiv, Lviv og Kharkiv, Ukraina (250.500 kr)**

Felagsskapurin skipar fyri seks verkstovum fyri 300 gentum í aldrinum 14-17 ár, sum búgva á barnaheimi ella á kostskúla. Verkstovnur hava evni sum rættindi, javnstøða, heilsa, reinføri, harðskapur, human trafficking og leiðsla á dagskránni. Felagsskapurin nýtir eisini verkætlanina til at framleiða undirvísingartilfar, sum felagsskapurin kann nýta í framtíðini.

### Path to Equal Opportunities

**Who But We – Kharkiv, Ukraina (185.400 kr)**

Lokali áhugafelagsskapurin ger ábøtur á undirvísingarhøli og tillagar tey, so børn við ymiskum tørvi fáa betri atgongd. Til dømis er lyfta komin við einar trappur, og neyðug útgerð og undirvísingaramboð eru útvegað, so børn við ymiskum tørvi kunnu luttaka í undirvísingini.

Felagsskapurin skipar fyri skeiðum í inklusjón fyri námsfrøðingum og lærarum. Felagsskapurin veitir flutning millum skúla og heim til børn, sum annars ikki hava møguleika at koma í skúla, t.d. tí skúlabussarnir ella teirra privatu akfør ikki rúma koyristólum. Foreldur at børnum við ymiskum tørvi fáa sálarfrøðiliga hjálp og vitan um barnamenning, so tey kunnu veita børnunum neyðugan stuðul.

### Yrkisútbúgvingar og inklusjón til ung, ið bera fjølbrek

**Sense International – Singida, Tansania (384.000 kr)**





Felagsskapurin hevur sum høvuðsendamál at stuðla deyvblindum kring heimin, og verkætlanin stuðlar trimum undirvísarum á einum lærarskúla at fáa førleikar í at útbúgva lærarar á tekniskum skúlum í brekinklusjón. Gjøgnum verkætlanina verða 10 lærarar útbúnir at undirvísa næmingum við fjølbreki í tekniskum førleikum, her íroknað deyvblindum ungum. Verkætlanin stuðlar eisini núverandi næmingum at fáa egið starv og harvið møguleika at uppihalda sær sjálvstøðugt og integrerast í lokalsamfelagið, samstundis sum nærumhvørvið fær upplýsing og stuðul at tryggja rættindi og vælveruna hjá teimum ungu, ið bera fjølbrek.

## ÚTBÚGVING

### Matpakkar til skúlabørn kring alt landið

**World Food Programme – Alt landið, Ukraina (1.000.000 kr)**

Fimm milliónir íbúgvar í Ukraina hava ikki nøktandi atgongd til mat, og av teimum eru 426.000 íbúgvar í bráðfeingis váða fyri at fáa lívshættisligar avleiðingar av manglandi mati og føðslu. Stuðulin til ST-felagsskapin fer til virkisætlanina at veita skúlabørnum mat í økjum, har vørur og matur hava sera torført við at náa fram vegna manglandi atgongd, stongd vegakervi og vanda fyri álopum. Við virkisætlanini veitir felagsskapurin umleið 200.000 skúlabørnum mat hvønn mánaða.

## Endurreisa barnaskúla í Sokon

**New Life Outreach – Arusha, Tansania (421.600 kr)**





Verkætlanin hevur stuðlað lokalsamfelagnum í Sokon 1 Ward í Arusha í Tansania at endurreisa barnaskúlan at kunna hýsa 1.000 næmingum og veita teimum undirvísing á høgum støði. Stuðulin varð millum annað nýttur til umvæling av bygninginum, innkeyp av undirvísingartilfari og førleikamenning til starvsfólk innan fyrisiting, so lokalsamfelagið megnar at reka skúlan sjálvi. Felagsskapurin rekur ein annan skúla, sum áður hevur fingið stuðul, men sum nú er fíggjarliga sjálvberandi. Skúlin veitir eisini ókeypis útbúgving til næmingar í størstu váðabólkunum og í summum førum ókeypis kostskúla.

## Sjónvarpssendingar, sum máttmenna kvinnur og arbeiða ímóti mismuni vegna kyn

**Kirkjuliga Heimamissiónin – Miðeystur og Norðurafrika (481.000 kr)**

Verkætlanin sendir fylgisveinasjónvarp og veitir tilfar á internetinum, sum fremur rættindi hjá kvinnum og møguleikum hjá kvinnum at verða hoyrdar. Neyva talið av luttakarum er ókent, men málbólkurin eru kvinnur í MENA økinum (Miðeystur og Norðurafrika). Verkætlanin hevur harumframt sum óbeinleiðis endamál at stimbra leiklutin hjá kvinnum í samfelagnum og broyta samfelagsnormar og mentan, sum mótvirka aktivum leikluti hjá kvinnum. Verkætlanin framleiðir átta sendingar, sum verða sendar á SAT-7 netverkinum og øðrum miðlum so sum YouTube. Gjøgnum verkætlanina fáa kvinnur áræði at taka ein størri leiklut í lokalsamfelagnum og arbeiða fyri fleiri rættindum.

## Endurbygging av barnagørðum og forskúlum

**Brokers Without Borders – Mykolaiv, Ukraina (340.600 kr)**

Felagsskapurin umvælir tríggjar barnagarðar og forskúlar til børn í aldrinum 3 til 6 ár í Mykolaiv til at virka aftur og veita atgongd til børn, sum bera brek. Við umvælingini fáa barnagarðarnir reint drekkivatn, og ein av barnagørðunum fær eitt trygt bumbuskýli við umstøðum hjá børnunum at uppihalda sær undir loftálopum.

### Styrkt undirvísingarkervi í Eysturukraina

**Responsible Citizens – Dnipro, Ukraina (300.500 kr)**

Verkætlanin veitir eykaundirvísing til børn í aldrinum 6-17 ár, sum eru dottin afturúr námsfrøðiliga. 70% av undirvísingini er offline, og 30% av undirvísingini er online. Eisini heldur verkætlanin tvey skeið fyri 60 lærarum um at veita undirvísing undir krígsumstøðum.

### Undirvísing í sosialari og kensluligari læring til børn við hermót

**Ukrainian Smile – Zaporizhzhia, Mykolaiv og Dnipro, Ukraina (390.300 kr)**

Verkætlanin skapar ein talgildan undirvísingarpall, sum sameinir vanligar undirvísing til børn við sosialari og kensluligari læring. Endamálið er at veita børnum í váðaøkjum sálarliga trygd og stuðla lærarum at undirvísa í hesum evnum. Gjøgnum verkætlanina verða 500 lærarar upplærdir at nýta talgildu undirvísingina. Harumframt fáa lærararnir og 4.000 næmingar persónligan stuðul til námsfrøðiliga og tøknifrøðiliga menning.

### Education at Risk

**Children of Heroes – Alt landið, Ukraina (430.600 kr)**

Felagsskapurin veitir fjøltáttaða langtíðarhjálp til børn, sum hava mist eitt ella bæði foreldur í hertænastu, og veitir ein-til-ein fjarundirvísing til 430 børn uttan foreldur.

## ALIVINNA

### Hægri útbúgving og vegleiðing innan alivinnu til fellows frá ST-ætlanini GRÓ

**Firum – Kuba, Malavi, Sierra Leone, Jamaika og Nikaragua (546.684,00 kr)**





Gjøgnum samstarvsavtalu við Føroya landsstýri luttekur Firum í ST-ætlanini GRÓ Fisheries Training Programme, ið stuðlar ungum serfrøðingum úr londum við undirmentari fiski- og

alivinnu. Luttakararnir, sum komu til Føroya í 2024 at fáa førleikar gjøgnum alivinnubreytina, vóru úr Kuba, Malavi, Sierra Leone, Jamaika og Nikaragua. Eftir uppihaldið í Føroyum veita serfrøðingar frá Firum víðari vegleiðing til verkætlanir teirra at menna alivinnu í heimlandinum, bæði í útbúgvingarhøpi og í verki. Stuðulin verður latin sambært samstarvsavtalu við Firum.

### Aling av karpu og øðrum vatnfiski í hyljum til fólk í minnilutabólkum

**Food for the Hungry UK – Rajshahi District, Bangladesh (436.000 kr)**





Stuðulin í ár fór til triðja og harvið síðsta stigið av verkætlanini, ið førleikamennir lokalar íbúgvar úr minnilutabólkum til at ala karpu í hyljum og reka burðardygga alivinnu. Endamálið er bæði at tryggja egna matframleiðslu og hava tilfeingi at selja á lokala marknaðinum. Flestu luttakararnir eru kvinnur ella frá upprunabólkum, sum vanliga hava tey ringastu útliti fyri at fáa virðiligar starvsmøguleikar. Á hesum triðja stignum av verkætlanini verða 200 luttakarar afturat tiknir við í verkætlanina.

## STUÐUL TIL NEYÐHJÁLPARÁTØK

Neyðhjálp verður vanliga latin góðkendum umsóknum, sum koma inn leypandi gjøgnum árið, tá ein bráðfeingis vanlukka ella tørvur er íkomin. Tó kundu felagsskapir eisini søkja um stuðul til neyðhjálparátøk í Ukraina í sambandi við umsóknarfreistina til verkætlanarstuðul. Munurin millum verkætlanarstuðul og stuðul til neyðhjálparátøk er í høvuðsheitum, at verkætlanir snúgva seg um langtíðarloysnir, sum kunnu vísa á eitt "úrslit", meðan neyðhjálp vanliga útvegar mat, klæði, reinførislutir, skjól, drekkivatn, heilsutænastur og sálarliga fyrstuhjálp, sum ikki altíð hevur annað "úrslit" enn, at móttakarin fekk nøktað ein bráðfeingis tørv á virðiligan hátt.

16 umsóknir komu um neyðhjálparátøk í Ukraina á tilsamans 11,3 mió. kr., og ráðgevandi nevndin fyri altjóða menningarsamstarv tilmælti at játta stuðul til seks teirra á tilsamans 2,5 mió. kr. Í fýra førum varð stuðul latin til smærri, lokalar felagsskapir við upphæddum millum 125.000 kr. og 370.000 kr., og í tveimum førum varð stuðul latin til størri, altjóða felagsskapir (ADRA Danmark og Medair UK) við upphæddunum 750.000 kr. og 760.000 kr. Samlaði stuðulin til neyðhjálparátøk í Ukraina var 2.495.000 kr., sum er 39% av samlaða stuðlinum til neyðhjálp í 2024. Her er samstarvsavtalan við Reyða Kross Føroya á 2 mió. kr. íroknað. Um samstarvsavtalan við Reyða Kross Føroya ikki verður tikin við, var býtið av stuðlinum til Ukraina 56% av samlaða stuðlinum til neyðhjálp í 2024.

Føroya landsstýri hevur samstarvsavtalu við Reyða Kross Føroya at lata upp til 2 mió. árliga til altjóða humanitert arbeiði sambært árligum virkisætlanum hjá felagsskapinum. Fyri árið 2024 søkti felagsskapurin um stuðul til fýra átøk í londunum Irak, Malavi, Nepal og Libanon, sum bleiv játtaður. Eisini søkti Reyði Krossur Føroya um bráðfeingis stuðul eftir vanlukkur í Íslandi, Vanuatu og Libanon, sum varð játtaður. Eisini varð stuðul játtaður til flóttafólk í Armenia.

Stuðul til neyðhjálp varð latin til torgreiddu kreppurnar í Sýria, Jemen og Haiti. Harumframt varð stuðul latin til neyðsynjarvørur til nýføðingar og fólk í størstu váðabólkunum í Gaza. Hesar fýra tær seinastu kreppurnar teljast millum heimsins ringastu humaniteru kreppur.

Talvan niðanfyri vísir neyðhjálparátøkini, ið fingu stuðulsjáttan í 2024:

| Høvuðsgeiri | Land | Felagsskapur | Upphædd |
|---|---|---|---|
| Torgreiddar kreppur | Sýria | ADRA Danmark | 250.000 kr |
| Torgreiddar kreppur | Jemen | ADRA Danmark | 250.000 kr |
| Torgreiddar kreppur | Haiti | CARE Danmark | 250.000 kr |
| Skjól | Ukraina | Borys Voznytsky Foundation | 300.000 kr |
| Náttúru- og veðurlagsvanlukkur | Ísland | Reyði Krossur Føroya | 250.000 kr |
| Náttúru- og veðurlagsvanlukkur | Vanuatu | Reyði Krossur Føroya | 250.000 kr |
| Náttúru- og veðurlagsvanlukkur | Irak | Reyði Krossur Føroya (samstarvsavtala) | 350.000 kr |
| Náttúru- og veðurlagsvanlukkur | Nepal | Reyði Krossur Føroya (samstarvsavtala) | 350.000 kr |
| Náttúru- og veðurlagsvanlukkur | Malavi | Reyði Krossur Føroya (samstarvsavtala) | 300.000 kr |
| Barnavernd | Ukraina | Faith, Hope, Love | 370.000 kr |
| Barnavernd | Ukraina | ADRA Danmark | 750.000 kr |
| Barnavernd | Libanon | Reyði Krossur Føroya (samstarvsavtala) | 850.000 kr |
| Barnavernd | Ukraina | Memory 86 | 125.000 kr |
| Flóttar | Armenia | Mission10forty | 225.000 kr |
| Flóttar | Libanon | Reyði Krossur Føroya | 250.000 kr |
| Matur | Ukraina | Eudemony of Ukraine | 190.000 kr |
| Heilsa og reinføri | Gaza | CARE Danmark | 250.000 kr |
| Heilsa og reinføri | Ukraina | Medair UK | 760.000 kr |

Allir felagsskapir kunnu nýta upp til 7,5% av stuðlinum til fyrisitingarligar kostnaðir. Tó er tað einans samstarvsavtalan við Reyða Kross Føroya, sum beinleiðis frámerkir tey 7,5% sum eina upphædd fyri seg. Hjá Reyða Krossi Føroya var hendan upphæddin 150.000 krónur í 2024, og henda upphædd er ikki uppgjørd í hesi talvuni ella í tertuyvirlitinum á næstu síðu. Hjá hinum felagsskapunum er fyrisitingarliga upphæddin uppgjørd sum partur av fullu stuðulsupphæddini.

**Stuðul til neyðhjálp býttur eftir høvuðsgeira**

Í samsvari við heildarætlanina hjá landsstýrinum um at stuðla átøkum, ið bøta um korini hjá børnum og ungum, varð stuðulin til neyðhjálparátøk í Ukraina játtaður til átøk innan høvuðsgeirarnar skjól, heilsu og reinføri, barnavernd og mat. Øll hesi átøk løgdu dent á at nøkta tørvir hjá børnum og ungum.

Størsti høvuðsgeirin var barnavernd, ið fevndi um stuðul til fýra neyðhjálparátøk á tilsamans 2.095.000 kr. Næststørsti høvuðsgeiri, ið stuðul varð latin til, vóru náttúru- og veðurlagsvanlukkur. Av hesum vóru 1.000.000 kr. játtaðar til virkisætlanina hjá Reyða Krossi Føroya, og 500.000 kr. eftir brádligar vanlukkur í Íslandi og Vanuatu. Hesin stuðul varð eisini latin umvegis Reyða Kross Føroya til neyðhjálparvirksemið hjá lokalu Reyða Kross felagsskapunum í londunum.

Tvey átøk fingu stuðul innan heilsu og reinføri á tilsamans 1.010.000 kr., trý átøk fingu stuðul til torgreiddar kreppur (complex crises) á tilsamans 750.000 kr., tvey átøk fingu stuðul til flóttar á tilsamans 475.000 kr., og eitt átak við bráðfeingis skjóli og eitt átak við mati fingu stuðul á ávikavist 300.000 kr. og 190.000 kr.



## SKJÓL

### Móttøkuhús í Lviv til innanhýsis flóttar frá krígsøkjum

**Borys Voznytsky Charitable Foundation – Lviv, Ukraina (300.000 kr)**





Felagsskapurin veitir bráðfeingisskjól í Lviv, sum er størsti miðdepilin fyri innanhýsis flóttar úr Eysturukraina. Síðan skjólið lat upp í 2023, hava yvir 800 børn, 500 eldri og 170 fólk, ið bera brek, havt fyribils uppihald í húsunum. Stuðulsupphæddin gav felagsskapinum møguleikan at veita fult og virðiligt uppihald í fimm mánaðir til 627 innanhýsis flóttar. Hvør familja fekk egið kamar og allar neyðsynjarvørur so sum mat, drekkivatn, klæði, seingjarklæði og lutir til reingerð. Eisini veitir skjólið sálarfrøðiligan stuðul, námsfrøðilig tilboð, neyðuga læknaviðgerð við heilivági og frítíðartilboð og ítrótt til børnini. Miðallongdin á hvørjum uppihaldi er 14 dagar, tá familjurnar vanliga hava megnað at finna egnan bústað í Lviv.

## NÁTTÚRU- OG VEÐURLAGSVANLUKKUR

### Vanlukkutilbúgving og ávaringarskipanir

**Reyði Krossur Føroya – Irak (350.000 kr)**

Irak er eitt av heimsins mest viðbreknu londum at verða rakt av veðurlagsvanlukkum. Landið verður javnan rakt av ekstremum hita, turki, vatnflóðum og sandstormum, samstundis sum samfelagið ikki er nóg væl tilbúgvið at handfara hesar avbjóðingar. Við stuðlinum styrkir irakiski Reyði Hálvmáni lokala tilbúgving gjøgnum váðametingar og ávaringarskipanir, ið menna førleikar hjá íbúgvum at verja seg móti vanlukkum. Stuðulin verður latin sambært samstarvsavtalu við Reyða Kross Føroya.

## Jarðskjálvti

**Reyði Krossur Føroya – Vanuatu (250.000 kr)**



Oyggjaríkið í Kyrrahavinum varð rakt av hørðum jarðskjálvta á 7,4 Richter stig, ið oyðilegði heim, samferðslukervi, sjúkrahús, skúlar og vatnveiting. Við stuðlinum veitir lokali felagsskapurin hjá Reyða Krossi neyðsynjarvørur, heilsutænastur og sálarfrøðiliga hjálp til neyðstødd.

## Eldgos

**Reyði Krossur Føroya – Ísland (250.000 kr)**

Stuðulin varð latin íslendska Reyða Krossi at veita bráðfeingis skjól og neyðsynjarvørur til íbúgvar, ið vórðu sendir burtur úr Grindavík vegna oyðileggjandi eldgosini, ið raktu bygdina.

## Ódnir, vatnflóð og turkur

**Reyði Krossur Føroya – Malavi (300.000 kr)**

Síðstu árini er Malavi rakt av afturvendandi ódnum, vatnflóð, turki og umfarssjúkum. Umframt at gera fátækadømið í landinum verri, økja veðurlagsvanlukkur eisini um vandan fyri, at børn verða gift burtur og at harðskapur verður algongdur. Hetta ávirkar bæði fólkaheilsuna og sálarligu heilsuna hjá íbúgvum. Við stuðlinum víðkar malaviski Reyði Krossur sítt virksemi at fevna um førleikamenning av ungdómsleiðarum at skipa fyri tiltøkum og átøkum, sum stuðla broyting í samfelagsnormunum. Børn og ung, sum búgva í umhvørvi, sum ofta verða rakt av

veðurlagsvanlukkum, fáa fyrimyndir, sum vísa teimum, at tey kunnu tora at tosa opið um trupulleikar og sálarliga heilsu. Somuleiðis fáa tey vón og vegleiðing at velja góðar lívsleiðir, hóast lívið er merkt av mótgongd. Stuðulin verður latin sambært samstarvsavtalu við Reyða Kross Føroya.

### Jarðskjálvti

**Reyði Krossur Føroya – Nepal (350.000 kr)**



Ógvusligi jarðskjálvtin, sum rakti Nepal í endanum av 2023, hevði fleiri enn 300 eftirskjálvtar. Vanlukkan kravdi mong mannalív og hevur eisini havt stórar sálarligar avleiðingar fyri íbúgvar í vestara partinum av landinum. Við stuðlinum útbýr nepalski Reyði Krossur tilbúgvingartoymi í sálarligari fyrstuhjálp og veitir tiltøk at styrkja sálarligu heilsuna hjá starvsfólki og sjálvbodnum, sum arbeiða í kreppuraktu økjunum. Stuðulin verður latin sambært samstarvsavtalu við Reyða Kross Føroya.

## TORGREIDDAR KREPPUR

### Hjálp at lívbjarga sær í eini av heimsins størstu humaniteru kreppum

**ADRA Danmark – Jemen (250.000 kr)**

Neyðhjálparátakið veitir lokalum íbúgvum reiðan pening fyri at luttaka í arbeiðstiltøkum at byggja uppaftur lokalsamfeløg, umhvørvi og vatn- og heilsukervi. Við reiðum peningi fáa

luttakararnir lívbjargað sær á virðiligan hátt gjøgnum arbeiðsmøguleikar, og felagsskapurin stuðlar íverksetan av egnum virksemi í lokalu økjunum. Átakið leggur eisini dent á at fyribyrgja harðskapi móti kvinnum og harðskapi í nærsambondum og at stuðla barnavernd.

### Styrkja leiklutin hjá kvinnum og gentum í torgreiddari langtíðarkreppu

**CARE International – Haiti (250.000 kr)**



Haiti er rakt av eini langari og torgreiddari humaniterari kreppu, har yvir helvtin av íbúgvunum tørvar bráðfeingis stuðul, og kreppan versnar alsamt vegna afturvendandi veðurlagsvanlukkur og ófrið. Felagsskapurin hevur sum grundleggjandi endamál at styrkja leiklutin hjá kvinnum og gentum í neyðstøðum og samstarvar við lokalar áhugabólkar at røkka hesum málinum í øllum lokalum virksemi. Neyðhjálpin hjá felagsskapinum fevnir um fyribyrging av harðskapi vegna kyn, fíggjarligan stuðul á virðiligan hátt, heilsutænastur, vatn og reinføri, og í øllum virkseminum leggur átakið dent á at stuðla lokalum kvinnum bæði sum átaksleiðarar, sum mynda virksemið, og rættindi og sjálvræði hjá gentum og kvinnum, sum luttaka í virkseminum.

### Hjálp at fóta sær eftir langt borgarakríggj

**ADRA Danmark – Sýria (250.000 kr)**



Neyðhjálparátakið stuðlar íbúgvum í størstu váðabólkunum við reiðum peningi, sum á virðiligan hátt gevur teimum møguleika at keypa mat og lívbjarga sær. Eisini fáa lokalsamfeløg stuðul til at byrja egið virksemi, so tey framyvir sjálvi megna at uppihalda sær. Børn sleppa aftur í skúla og fáa barnavinarlig tilboð, sum hava til endamáls at betra um teirra sálarligu heilsu.

## BARNAVERND

### Born to be Oneself

**Memory 86 – Zaporizhzhia, Ukraina (125.000 kr)**





Lokali felagsskapurin stuðlaði førleikum hjá gentum í størstu váðabólkum at verja sína likamliga og sálarliga heilsu gjøgnum upplýsing um kvinnuheilsu, skeið í samskifti, listaterapi, venjingar í

leiðslu, sálarfrøðiliga vegleiðing og tiltøk móti kynsligum harðskapi. Harumframt fingu luttakararnir reinførislutir at eiga.

### Sálarfrøðiligur stuðul til palestinsk flóttabørn í Libanon

**Reyði Krossur Føroya – Libanon (850.000 kr)**



Í Libanon búgva umleið 300.000 flóttar úr Palestina í 12 flóttalegum kring landið, har palestinski Reyði Hálvmáni hjálpir at reka frítíðarvirksemi og sosial tilboð. Sum flóttar hava tey ikki rættindi til sosialar tænastur, fastogn, lønt arbeiði ella borgaraskap, sum læsir mong føst í fátækadømi og ringari sálarligari heilsu. Við stuðlinum útbýr palestinski Reyði Hálvmáni fleiri sjálvboðin í sálarligari fyrstuhjálp og gevur teimum førleikar at kenna tørvirnar hjá børnum, sum eru rakt av kríggi og ófriði, og útgerð og tilfar at stuðla teimum gjøgnum barnavinarligt virksemi. Eisini fer partur av stuðlinum til bráðfeingis tørvir sum reinførislutir, heilivág og neyðskjól. Stuðulin verður latin sambært samstarvsavtalu við Reyða Kross Føroya.

### Sálarfrøðiligur stuðul til børn undir bumbuálopum

**ADRA Danmark – Dnipro, Zaporizhzhia, Kharkiv, Poltava, Zhytomyr og Kyiv, Ukraina (750.000 kr)**

Neyðhjálparátakið stuðlar børnum í krígsherjaðum økjum við tungum sálarligum løstum at fáa ókeypis atgongd til sálarfrøðiliga hjálp gjøgnum bólkaviðgerðir og spæliterapi. Lærarar, foreldur og verjar hjá børnum fáa venjing at stuðla sálarligu heilsuna hjá børnunum og kunning um viðgerðartilboð til børnini, og bumbuskýli í skúlum fáa útgerð og tilfar til børn at hugsavna seg um undir bumbuálopum.

### Kreppuhjálp og bráðfeingisstuðul til viðbreknar familjur í krígsherjaðum økjum

**Faith, Hope, Love – Odessa, Mykolaiv og Kherson, Ukraina (370.000 kr)**




Neyðhjálparátakið stovnaði tvey toymi, sum høvdu sálarfrøðing, sosialráðgeva, málsviðgera og bilførara. Hesi toymini gjørdu 32 vitjanir til 18 útjaðaraøki í Odessa, Mykolaiv og Kherson. Felagsskapurin megnaði at røkka 600 familjum í váðabólkum so sum innanhýsis flóttar, stakir uppihaldarar, fólk, sum bera brek og familjur, har ein vaksin er deyður í hertænastu, og sum ikki sjálvi hava møguleika at søkja kreppuhjálp og sosialar tænastur. Familjurnar fingu mat, fyrstuhjálpareskjur, reinførislutir og heit undirklæði. Harumframt fingu familjulimirnir høvi at luttaka í listterapi og verkstovum, sum fyribyrgja harðskapi vegna kyn. Luttakarar úr serligum váðabólkum fingu eisini eyka hjálp frá toymunum at tryggja virðiliga yvirliving gjøgnum veturin.

## FLÓTTAR

### Innanhýsis flóttar undan ófriði í Suðurlibanon

**Reyði Krossur Føroya – Libanon (250.000 kr)**

Á heysti versnaði ófriðurin við syðra landamarkið í Libanon, sum førdi við sær, at fleiri íbúgvar flýggjaðu innanhýsis í landinum. Heilsumiðstøðir, vatnverk og sjúkrahús stongdu, sum øktu trýstið á undirstøðukervið, heilsuverkið og ambulansutænastur. Stuðulin til libanesiska Reyða Kross varð nýttur til neyðsynjarvørur so sum skjól, drekkivatn, reinførislutir og lívbjargandi heilsutænastur og sálarligan stuðul.

### Flóttar undan ófriði í Nagorno-Karabakh

**Mission10forty – Armenia (225.000 kr)**




Á heysti í 2023 flýggjaðu yvir 100.000 etniskir armenar úr Nagorno-Karabakh landspartinum í Aserbadjan yvir til Armenia vegna versnandi ófrið. Í samstarvi við felagsskapin World Vision Armenia varð stuðulin til neyðhjálparátakið nýttur at veita sosialráðgeva, sálarliga fyrstuhjálp, mat og lutir til 50 húski í størstu váðabólkunum at yvirliva veturin á virðiligan hátt.

## MATUR

### Bráðfeingisstuðul til børn og ung á hermótunum

**Eudemony of Ukraine – Kharkiv, Mykolaiv og Odessa, Ukraina (190.000 kr)**

Neyðhjálparátakið veitir mat og neyðsynjarvørur til 360 børn og ung og foreldur teirra í krígsherjaðum økjum í Kharkiv, Mykolaiv og Odessa. Lokalir sosialráðgevar vísa á, hvørji børn og ung hava størstan tørv, og sjálvboðin hjá felagsskapinum hjálpa til at keypa vørurnar í heilsølu, pakka í eskjur til hvønn einstakling og koyra eskjurnar til dyrnar, har luttakararnir búgva.

## HEILSA OG REINFØRI

### Førleikamenning, útgerð og tilfar til lokalar heilsutænastur

**Medair UK – Vesturukraina, Sumy og Kharkiv, Ukraina (760.000 kr)**

Neyðhjálparátakið styrkir førleikan hjá lokalum heilsutænastum, sum eru undir stórum trýsti, at røkka yvir 50.000 luttakarum í størstu váðabólkunum við bráðfeingis stuðli so sum skjól, sálarfrøðiligari fyrstuhjálp, heilsutænastum, reinførislutum og neyðsynjarvørum. Við at førleikamenna lokal starvsfólk at arbeiða undir krígsumstøðum og veita neyðuga útgerð til virðiliga viðgerð, tryggjar átakið, at førleikarnir eisini koma neyðstøddum til góðar framyvir.

## Neyðsynjarvørur til nýføðingar og íbúgvar í størstu váðabólkunum

**CARE International – Gaza (250.000 kr)**




Kríggið í Gaza er ein av heimsins størstu kreppum og hevur ført til, at nærum øllum íbúgvum tørvar bráðfeingis stuðul fyri at lívbjarga sær. Neyðhjálparátakið veitir neyðsynjarvørur til møður við nýføðingum og reinførislutir, neyðskjól og matgerðaramboð til innanhýsis flóttar í størstu váðabólkunum.